

Vit ynskja øllum børnum í Føroyum einar góðar páskir.

Góði Jesus, takk at Tú vildi doyggja á krossinum fyri mínar syndir.
Takk at Tú reis upp aftur og livir nú í mær.
Amen

Skuldarbókhaldari

Fyri ein av okkara kundum, eitt ídnaðarvirki í Tórshavn, verður søkt eftir einum persóni at taka sær av skuldara- og ognarabókhaldara, og annars at hjálpa til við øllum vanligum skrivstovuarbeiði.

Arbeiðsuppgávurnar eru í høvuðsheitum hesar:

- at bóka øll gjøld frá kundum
- at rykkja eftir peningi
- at tilrættisleggja rættsligar innheintingar
- at geva leiðsluni yvirlit yvir skuldarastøðuna
- at kanna og bóka allar rokningar frá øðrum
- at gjalda øllum ognarunum til tíðina.

Harafturat skal viðkomandi persónur hjálpa til í bókhaldinum, faktureringini og á skrivstovuni um tað gerst neyðugt.

Alt verður ført á teldu, so tað er avgjørt neyðugt, at tann ið fær starvið dugir at nýta teldur til bókhald og til alt skriviarbeiði. Tær skipanir ið nýttar verða eru: Navigator, WordPerfect, PlanPerfect og aðrar sergjørdar skipanir.

Stórur dentur verður lagdur á, at viðkomandi dugir væl at tosa við fólk og at skriva lættskiljandi gott føroyskt.

Fyri tann rætta persónin er hetta eitt spennandi starv, ið setur stór krøv til tær menniskjaligu og fakligu eginleikarnar.

Meiri fæst at vita um starvið, við at venda sær til Petur Anfinn Johannesen ella Jógvan Joensen.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast innan 30. apríl 1992 til:

Pf Grannskoðaravirkið
Jógvan Sundstein, statsaut. revisorar
Landavegur 92 . FR-110 Tórshavn
Box 191 . Tlf. + 298 14700 . Telefax + 298 13815
Attn.: Jógvan Joensen





Sveisiarbeiði/ rørarbeiði

og smærri dreygiarbeiði verða gjørd.

Richard Danielsen
tlf. 44015 - Fuglafjørður

Tilboð

um

máling av sethúsum

í Havn ynskist.

Tlf. 14143

sosialurin

Menningarinnflutningur

SAMHUGA TEBRØV Tanzania-te



Te'ið verður blandað í **Føroyum**, so tað júst hóvar **føroyskum gómum**.

SAMHUGI
Tlf. 10572

Søkt verður eftir

5 fólkum

at vaccinera smolt

Pf. Nýpásmolt

Tlf. 17679 ella 57790

sosialurin

Hús í Æðuvík

Eldri hús í Æðuvík til sølu.

Tlf. 41716

